# Hósdagur 14. mars

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 5:26
19.00 Myndlist í Føroyum 7 e
19.30 Svalan - ein svenskur bátur - svensk sending
20.00 Dagur og Vika
20.20 Magn
20.45 Svartur sannleiki - um listamannin Ingálv av Reyni
21.45 Lívið umborð 4:4 - donsk stuttrøð
22.15 Krimitímin: Anna Holt 13 - svensk røð
23.10 Vald andanna II
23.50 Vald andanna - eyka
0.00 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Sailing - Ocean Race
8.00 Golf - Us Pga Tour - Honda Classic
9.00 Ski Jumping - World Cup
10.00 Biathlon - World Cup - Live
11.30 Tennis - WTA Tournament
12.30 Biathlon - World Cup - Live
14.00 Cycling - Paris - Nice - Live
16.00 Cycling - Tirreno - Adriatico
17.00 Biathlon - World Cup
18.00 Biathlon - World Cup
19.00 Football - Kick In Action Special South America
19.30 Football - Gillette Dream Team - Live
21.30 News - Eurosportnews Report
21.45 Football - World Cup Stories
22.00 Football - Uefa Cup
0.15 News - Eurosportnews Report
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.10 TLZ: »Ape-Man – Adventures In Human Evolution – Exodus«
1.00 TLZ: »In The Blood – End of The Evolution«
2.00 TLZ: »Dramsci – Making Astronauts«
2.30 TLZ: »Hollywood Science - Speed«
2.40 TLZ: »Science Bites – The Virtually Perfect Yacht«
2.45 TLZ: »Truth Will Out«
3.00 TLZ: »Sunbaskers«
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »Elements of Healing«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top – The Receivers are Coming«
4.40 TLZ: »Science In Action«
5.00 TLZ: »Le Club
5.15 TLZ: »Le Club
5.30 The Ozmo English Show
6.00 Bits & Bobs
6.15 The Shiny Show
6.35 Angelmouse
6.40 Playdays
7.00 Get Your Own Back
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Country Tracks
9.15 Battle of the Sexes in the Animal World: »Ways of Being Male
9.45 Vets in Practice: »Mum's The Word«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Trial of a Timelord – Terror of the Vervoids«
11.30 Holiday Swaps: »Sweden Rafting/Kos«
12.00 Eastenders
12.30 Our Mutual Friend
13.30 Ready Steady Cook
14.15 Bits & Bobs
14.30 The Shiny Show
14.50 Angelmouse
14.55 Playdays
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »Blood and Water«
16.45 The Naked Chef: »A Birthday Bbq«
17.15 Gardeners' World 2001
17.45 The Weakest Link
18.30 Holiday Swaps: »Switzerland/Tunisia«
19.00 Eastenders
19.30 Goodness Gracious Me
20.00 Dangerfield: »The End of The Affair«
21.00 The Young Ones: »Interesting«
21.35 Body Chemistry: »Hormone Heaven?«
22.25 The Big Trip
22.50 Holiday Snaps: »Corfu/Lanzarote«
23.00 Casualty

**BBC WORLD**

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 Holiday (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Reporters (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Asia Today (r)
2.45 World Business Report (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 HARDtalk
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 World Business Report
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
6.45 Sport Today
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 Holiday (r)
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Africa Direct (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 Asia Today
9.45 Sport Today
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 World Business Report
11.45 Sport Today
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 The Car's The Star (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 Africa Direct (r)
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Asia Today
15.00 BBC News
15.30 HARDtalk (r)
16.00 BBC News
16.15 World Business Report – followed by Weather
16.30 Talking Movies (r)
17.00 BBC News – followed by Weather
17.30 World Business Report
17.45 Sport Today
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 HARDtalk (r)
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 Click Online
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 World Business Report
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 The Money Programme
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 World Business Report (r)
22.45 Asia Today

**TV 3**

5.30 Børne-hjørnet med Disney
7.10 TV-shop
8.10 Hvide løgne
8.35 Ricki Lake
9.25 Ricki Lake (G)
10.20 Horton-sagaen (G)
11.10 Horton-sagaen
12.00 Med på moden
12.30 Pæn pige – sej sild
12.55 Melrose Place – Classic
13.50 Felicity
14.40 Baren 2002 (G)
15.10 Dawson Creek – Classic
16.05 Ricki Lake
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Alle tiders barnepige
18.30 Baren 2002
19.00 Skadestuen
20.00 Baren 2002 – direkte
21.00 Sex and the City
21.35 The Guardian
22.30 Baren 2002 (G)
23.00 Baren 2002 – direkte (G)
0.00 Vore værste år
0.30 Simpsons
1.00 Nash Bridges
1.55 Ricki Lake (G)
2.45 Drøm videre
3.15 Vore værste år (G)
3.40 Guys like us
4.05 Sunset Beach
5.00 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Olaf Magnussen á Toftum lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Olaf Magnussen á Toftum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Helgi Jacobsen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Victor Carlsen leguur til rættis
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Deyðanum nær - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Tá ið eg havi málað summarhúsið - Páll Danielsen lesur 2. part av skaldsøgu eftir Oddvør Johansen
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Tilvera: Deyðanum nær




Gestur í útvarpsstovuni er Jastrid Joensen. Hon sigur frá, tá maður hennara gjørdist sjúkur og varð sendur til Danmarkar at verða skurðviðgjørdur.

Eftir hesa viðgerð varð maðurin lagdur í respirator, og støðan var so álvarsom, at vakt var yvir honum. Men so fór at ganga betur, og maðurin peikaði á ein skriviblokk.

Við tógvið stríð skrivaði hann, hvat hann hevði sæð í øðrum Landi.

LISA – 20 ÁR

## Svartur sannleiki




Sjónvarpsfilmur um listamannin Ingálv av Reyni og stríð hansara fyri sannari og erligari list. Um ein mann við konstrastum. Mildur móti øðrum, harður móti sær sjálvum. Føroyingur og heimsborgari. Djarvur og ivandi. Altíð á veg fram, leitandi eftir nýggjum møguleikum og nýggjum leiðum. Við Ingálvi sum frásøgumanni ferðast vit umkring í myndaheimi listamansins. Ein málningur verður til. Hann teknar í Saksun, meðan árstíðir skifta, og hann fer til París at leita sær íblástur, so at hann kann halda áfram at mála. Hetta er ikki ævisøgan um Ingálv av Reyni. Filmurin er heldur ein persónslýsing, har roynt verður at lýsa nakrar sermerktar síður av listamanninum.

Lagt til rættis: Dánjal Højgaard og Hans Petur Hansen.

Fotografur: Hans Petur Hansen.
Ljóðupptøkur: Herluf Sørensen.
Sett saman: Per Zachariassen.

**ÚF**

## Morgunlestrar

**11.–16. mars**

***Olaf Magnussen á Toftum lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 11. mars:**
nr. 192 Mín Jesus, lat mítt hjarta fá
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær

**Týsdagin 12. mars:**
nr. 335 O, Guð, hav okkum við títt orð
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

**Mikudagin 13. mars:**
nr. 517 Hvat var Guðs jørð eitt fagnarstað
nr. 468 Frelsari, hevði ikki eg teg funnið

**Hósdagin 14. mars:**
nr. 520 Sólin hevur sama lag
nr. 4 Heilagt ljóð oss legg á tungu

**Fríggjadagin 15. mars:**
nr. 477 Jesus kæri, før tú meg
nr. 583 Mín bátur er lítil, títt hav er so stórt

**Leygardagin 16. mars:**
nr. 306 Mikli Drottur, gev mær megi
nr. 305 Leið meg, Guð, á lívsins veg

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sent verður úr Studio 7
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Oyru sum Jesus - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.40 Møtilýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti, Okkara Dagliga Breyð, Blandaður tónleikur, o.a.
2:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast



Atlantsmótið á vegamóti:

# Øll eygu vend móti Hessboring



*Um sama mundið sum Oljumálastýrið í frágreiðing síni til løgtingið leggur alstóran dent á komandi boringina hjá Amerada Hess-samtakinum bretsku megin landgrunsmarkið vitjaði nýggi leitistjórin hjá Amerada Hess fyri fyrstu ferð í Føroyum. Andrew Lodge tekur við eftir Richard Hardmann og Steve Boldy sum leitistjóri fyri Europa, Norðurafrika, Asia og Brasilia. Hósdagin hitti hann Eyðun Elttør, oljumálaráðharra og onnur í Oljumálastýrinum*

*Mynd Jens K Vang*

**Oljumálastýrið hevur latið úr hondum eina upplýsandi og sakliga frágreiðing um oljutilgongdina higartil. Tað er varið við at gera niðurstøður ella geva politikarunum ráð. Hinvegin krógvar frágreiðingin ikki tann veruleika, ta óvissu, ið er knýtt at oljuleitingini og møguleikanum at finna olju í rakstrarverdugum nøgdum**

OLJULEITING Á VEGAMÓTI

*Jan Müller*

Tað er ikki júst ein alt ov bjartskygd frágreiðing, sum Oljumálastýrið hevur latið løgtinginum um tilgongdina á oljuøkinum serstakliga hetta seinasta árið. Ikki tí – her er ikki nógv nýtt at lesa – tað mesta hevur verið frammi áður, tó at tað nú er sett saman í eina heild og gjørt lættfatiligt. Tann óvissa,



sum m.a. hevur verið umrødd og gitt um her í blaðnum, sýnist at hava hald í veruleikanum, tí í frágreiðingini nemur Oljumálastýrið fleiri staðni við hana. Frágreiðingin má tó sigast at vera rættiliga greið og upplýsandi. Hon umrøður stutt og greitt allar teir ymsu partarnar av oljutilgongdini og ger status tvs. ger greitt, hvussu støðan er á teimum ymsu økjunum í dag. Men hon fer ikki víðari – soleiðis sum vit t.d. síggja tað í mentanarálitinum – og kemur við ráðum og tilmælum til politikararnar og flokkarnar. Og orsøkin til tað er tann heilt einfalda: at enn veit eingin, um olja finst í rakstrarverdugum nøgdum í undirgrund okkara.

Tað er greitt, at frágreiðingin sum so er gott grundarlag hjá politikarum o.ø. til at gera sær sínar egnu metingar. Tó so at óvissan, sum ræður, ger tað torført at gera endaligar niðurstøður. Hesa mugu bíða nakað enn, í hvussu er til í summar, tá úrslitið av boring hjá Amerada Hess beint hinumegin markið helst verður kunngjørt. Verður tað positivt, so kann veruliga gongd og lív koma í alt økið aftur, verður tað minni gott, so kann hetta koma at seinka allari tilgongdini.

### Vónbrot og óvissa

Frágreiðingin er 85 síður og er ætlað løgtinginum sum grundarlag undir einum aðalorðaskifti um oljumál. Hetta orðaskiftið verður helst mikudagin í næstu viku. Í fororðunum sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður m.a., at úrslitini av leitingini seinasta ár kunnu tulkast á ymiskan hátt. Leitimiðini, sum størstar vónir vórðu settar til, gjørdust vónbrot, meðan rakt varð við olju í jarðløgum, har vónirnar frammanundan vóru rættiliga avmarkaðar. Landsstýrismaðurin kemur tí til ta niðurstøðu, at tað í fyrstu atløgu má roknast við, at hetta kemur at seinka boringini av komandi leitibrunnum á føroyskum øki. Oljufeløgini mugu sammeta seismisku úrslitini við úrslit frá boringunum fyri síðani at gera nýggja myndlar yvir jarðfrøðiligu viðurskiftini á føroyska landgrunninum. Sum frálíður nýtist hetta ikki at verða eitt afturstig fyri oljuleiting við Føroyar, staðfestir landsstýrismaðurin.

Hann vísir eisini á, at tað framvegis er ov tíðliga at siga, um lønandi framleiðsla kann spyrjast burtur úr kolvetnisfundinum hjá Faroes Partnership. Felagið skal í summar leggja endaliga borifrágreiðing fyri Oljumálastýrið og tá eisini meta um, hvat skal gerast afturat fyri at staðfesta, hvørt talan kann gerast um lønandi framleiðslu.

### Kolvetnisráð bíðar

- Vísandi til at oljuframleiðsla ikki stendur beint fyri framman havi eg gjørt av ikki at seta á stovn kolvetnisráðið, sum varð umrøtt í løgmansrøðuni í fjør. Eg eri kortini av teirri áskoðan, at eitt slíkt ráð eigur at verða skipað, áðrenn farið verður undir ítøkilig stdig móti kolvetnisframleiðslu sigur landsstýrismaðurin, sum eisini vísir á, at sum heild hevur Atlantsmótið ikki givið tey úrslitini, sum oljuídnaðurin hevði vónir um. Fundurin hjá Faroes Partnership kann tí fáa stóran týdning fyri, hvønn áhuga oljuídnaðurin fer at hava fyri føroyska økinum fyrstu komandi árini. - Fyribils kunnu vit vera vónrík, tí leitiskeiðið er ikki hálvrunnið og enn resta 5 brunnar at verða boraðir sigur landsstýrismaðurin.

Av tí at so stór óvissa er knýtt at leitingini og útlitunum verður í frágreiðingini gjørt greitt, at tað í besta føri um 2-3 ár fer at verða grundarlag fyri eini leiðbyggiætlan, sum tá fer at krevja støðutakan um alstórar verkætlanir, ið fata um bygging av umfatandi framleiðsluútbúnaði, umframt at borast skal ein røð av framleiðslubrunnum, áðrenn framleiðsla kann setast í verk. Um metingarnar koma til ta niðurstøðu, at grundarlag ikki er fyri at fara undir framleiðslu, verða neyvan gjørd stórvegis fleiri átøk í tilknýti til kolvetnisfundin hjá Amerada Hess komandi nógvu árini. Víst verður á møguleikanum fyri, at fundið hjá Hess gongur yvir í bretskt øki eisini, og at hetta fer at hava við sær, at tørvur verður á samskipan og samtroyting tvørturum landgrunsmarkið, um tað er so, at fundurin gongur inn á bretskt øki.

Víst verður annars á, eins og tað hevur verið mett í Sosialinum fyrr, at óvæntaðu úrslitini kunnu bera í sær, at feløgini, ið hava borað sín fyrsta brunn, fara neyvan at bora aftur fyrr enn í 2004, meðan Agip kann væntast at bora antin seint í ár ella næsta summar. Hetta ger aftur, at tað verður ringt at siga nakað um, nær vit fáa eitt annað útbjóðingarumfar.




*Nú eru øll eygu á Atlantsmótinum vend móti Amerada Hess og brunninum, sum Faroes Partnership skal bora í bretskum øki. Hildið verður við vissu, at fundið felagið gjørdi í føroyskum øki í fjør, gongur yvir í bretskt øki. Tað er hetta og møgulig stødd á fundinum, sum boringin í næstum skal siga nakað um*